# Posta Stamps

Føroyar Nr. **56**

Oktober 2023



Posta
FAROE ISLANDS

**Postgjaldsmerki: Útróðrarbátar**

**Heimsfilmur í Tindhólmi**

**Kolanámið í Hvalba**

Postgjaldsmerki 2024

# Útróðrarbátar




Útróður hevur, síðan fólk av fyrstan tíð búsettust í Føroyum, altíð verið ein tíðandi partur av undankomuni.

## Útróðrarbátar

Landbúnaðurin megnaði ikki av sjálvum sær at breyðføða tjóðina, so neyðugt var at leggja afturat við fugla- og hvalaveiðu – og ikki minst fiskiveiðu í heimasjógvi.

Høvuðsamboðið til hetta slag av fiskiveiðu var siðbundni føroyski báturin sprottin úr bátasmiðinum í víkingaøld. Ein bátur, ið bæði kundi rógvast og sigla undir segli. Bátaslagið finst í ymsari støðd skilmarkað av talinum av árum – frá teimum til tólv (her telist ein maður fyri hvørja árina). Vanligasta bátastøddin til lønandi útróður var áttamannafarið og tíggjumannafarið. Hesir bátar vóru vanliga felagstiltøk knýttir at bygdini ella størru bóndagørðunum.

Í seinnu helvt av 19. øld fóru føroyingar av álvara undir havfiskiskap við fiskiskipum. Hetta broytti føroyska samfelagið frá miðaldarligum bónda/veiðimannasamfelag til fiskitjóð burturav. Men útróðurin helt fram tó í niðursettum høpi, sum ískoyti til húsarhaldið – og eina eyka inntøku.




**Útróðrarbátar**
Listafólk: Janus D. Guttesen

Fyrst í 20. øld fóru menn undir at seta motorar í føroyska bátin. Hetta førdi við sær, at bátunum ikki longur tørvaði manning, men kundu rekast av einum ella tveimum monnum.

Motorrikni báturin kallaðist "installeringur" og gjørdist fyrimyndin fyri nútímans føroyska bátin, sum er endurgivin á fyrsta postgjaldsmerkinum. Báturin á myndini kallast "Greipan" TN 188. Ein 7 metur langur bátur heimahoyrandi í Hoyvík – bygdur av Jóan Petur Clementsen bátabyggjara í 2018.

Sum frá leið gjørdist deksbáturin vanligari í Føroyum í 20. øld. Fyrstu deksbátarnir vóru bygdir úr viði, vóru størri enn føroysku bátarnir og høvdu lastarúm undir dekkinum. Deksbáturin á næsta postgjaldsmerkinum er "Torvanes" FD 52 heimahoyrandi á Eiði. 18,7 metur langi báturin er 49,16 bruttotons – 19,54 nettotons. Torvanes varð bygdur á Ærøskøbing Skibs- og Bådebyggeri í Danmark í 1968.

Natúrliga menningin av trædeksbátinum var deksbáturin úr stáli, sum sæst á triðja postgjaldsmerkinum. Hetta er "Jóannes" SA 6 av Sandi. 10,79 metrar langur, 14,91 bruttotons – 3,76 nettotons. Jóannes var bygdur á Svenor Industri & Skibsservice í Noreg í 1977.

Nýggjasti sprotin á bulinum til bæði yrkis- og ítrivsútróður er glastrevjabáturin. Hesin bátur finst í fjølbroyttum skapi í Føroyum og hóskar yvirhøvur væl til útróður. Báturin á fjórða postgjaldsmerkinum er "Lilja" VA 72 heimahoyrandi í Sandavági. Lilja er 12 metur long, 6,3 bruttotons – 1,8 nettotons og varð bygd á Provincial Boat Marine í Kanada í 1993.

*Anker Eli Petersen*



**Útróðrarbáturin, Olevina**
Mynd: Ingi Sørensen

# Dronning Alexandrines Hospital 100 ár




Heitið hospital stavar upprunaliga frá miðaldarligu vistarhúsunum har tey ólukkuligu fólkini, ið høvdu herviligu spitalsku sjúkuna, vórðu avbyrgd frá restini av samfelagnum.

## Fyrsta hospitalið - Argir

Og fyrsta føroyska hospitalið var júst eitt sovorði tilhald. Í miðøld breiddi spitalskusjúka seg um alt Evropa – og heldur ikki Føroyar sluppu undan pláguni. Hetta var í katólsku tíðini, tá føroyska bispasetrið og mætasti valdsfaktorur á oyggjunum lá í Kirkjubø. Og tað var katólska kirkjan, ið tók stig til at hospitalið varð lagt á avbyrgdu kirkjujørðina á Argjum.

Avbyrgingin av teimum sjúku virkaði eftir ætlan – tey gjørdust alsamt færri – og herviligu pokurnar, ið herjaðu Føroyar í 1709, beindu so at siga fyri sjúklingunum á hospitalinum. Frá 1723 til 1736 vóru bara trý spitølsk eftir – og í 1852 doyði seinasti spitalski sjúklingurin í Føroyum.

## Landskirurgurin/fysikus

Men tað var ikki bara spitalskusjúka ið plágaði føroyingar upp gjøgnum øldirnar. Vanlig sjúka, løstir og smittuvandin í epide-




**Dronning Alexandrines Hospital 100 ár**
Listaverk: J. Waagstein, 1943
Design: Posta

miskum farsóttum í avbyrgda samfelagnum gjørdu, at myndugleikarnir fyrr enn í restini av ríkinum mettu tað vera neyðugt at hava løntar skurðlæknar (landskirurg) á oyggjunum. Longu í 1584 finna vit fyrsta skjalfesta "*barberin*" (skurðlæknan) í Føroyum. Í øldir var bara tann eini læknasessurin í Føroyum. Um brúk var fyri bráðfeingis læknahjálp, noyddust menn antin at flyta sjúklingin til Havnar, fara eftir skurðlæknanum við báti, ella bara bíða til næstu ferð læknin vitjaði bygdina ella oynna.

Tað sigur seg sjálvt, at umframt sjálva viðtaluna ella skurðviðgerðina, var onki slag av sjúkrarøkt undir sjúkugongdini.

## Færø Amts Hospital

Tað var tí eitt hart tiltrongt tiltak, tá man endiliga í 1823, bygdi "Færø Amts Hospital" í útjaðaranum á táverandi Havnini. Tað var eitt lítið sjúkrahús - eftir hvat skilst, upprunaliga við bara 7 seingjarplássum – men tó eitt stig fram á røttu leið. "Gamla hospital," sum tað vanliga kallast, virkaði í nærum heila øld. Í 1870 árunum varð ein minni bygningur reistur afturat við sigandi eyknavninum "cellan" ætlaður sjúklingum við sálarsjúkum. Hóast ávísar ábøtur, vóru umstøðurnar vesaligar - plásstrot, hóast ávísar víðkingar við tíðini, væntandi starvsfólk og undirfígging plágaðu Gamla Hospital alla ta tíð sjúkrahúsið virkaði.

Í 1842 gjørdist støðan eitt sindur betur, tá fyrsti útbúnið føroyski læknin, Napoleon Nolsøe, varð settur í starv umframt landskirurgin. Hann gjørdist síðan økislækni á Tvøroyri í 1852 og seinni komu tveir økislæknar afturat, ein í Klaksvík og ein í Vestmanna. Men ikki fyrr enn í 1897 vórðu fyrstu yrkissjúkrasystrarnar, danskar diakonissur, knýttar at sjúkrahúsinum og heimarøktini. Tað var eisini uppgávan hjá diakonissunum, at yvirtala føroyskar gentur at lata seg útbúgva til sjúkrasystrar. Eftir 1910 fóru fyrstu ungu føroysku kvinnurnar til Danmarkar á sjúkrasystraskúla. Tíggju ár seinni, í 1920, fýra ár áðrenn Færø Amts Hospital varð niðurlagt, byrjaði ein rættulig útbúgving av sjúkrasystrum í Føroyum, skipað av diakonissunum og medisinska yvirlæknanum á sjúkrahúsinum.



**Dr. Alexandrines Hospital, 1924**
Mynd: Tjóðsavnið

## Tvey privatsjúkrahús og eitt tuberklasanatorium

Í 1898 tóku einstaklingar seg saman um at stovna eitt lítið sjúkrahús við 8 seingjarplássum í Klaksvík. Seks ár seinni, í 1904 fekk Tvøroyri eitt líknandi sjúkrahús við 12 seingjarplássum. Bæði sjúkrahúsini eru síðani áhaldandi útbygd og virka í dag sum økiseindir í føroyska sjúkrahúsverkinum.

Hesa tíðina fór ein ógvuslig øking av tuberklasmittuni fram í Føroyum – og sum avleiðing av hesum varð eitt tuberklasanatorium bygt í Hoydølum í 1908 við 32 seingjarplássum.

## Dr. Alexandrines Hospital – Landssjúkrahúsið

Í 1924 varð gamla "Færø Amts Hospital" endaliga niðurlagt og virksemið flutt yvir í nýbygda "Dronning Alexandrines Hospital," sum hevði 65 seingjarpláss. Hetta fall annars saman við, at fyrstu sjúkrasystrarnar útbúnar í Føroyum vóru lidnar við útbúgvingina.

Hóast nýggja sjúkrahúsið var ein ógvuslig menning av kapasitetinum, var greitt frá byrjan av, at har ikki var nokk av plássi. Tuberklasóttin herjaði enn oyggjarnar, so longu í 1927 varð ein tuberkladeild við 20 plássum bygd afturat sjúkrahúsinum. Í 1952 var annar av TB bygningunum til vinstru á málninginum broyttur til røktardeild fyri kroniskar sjúklingar.

Í 1962 varð tuberklastøðin í Hoydølum niðurløgd og í staðin varð ein fyribils tuberkla- og røktardeild bygd heimanfyri sjúkrahúsið.

Í 1967 varð eyðkenda háhúsið tikið í nýtslu og kapasiteturin enn einaferð øktur munandi.

Síðan hava áhaldandi útbyggingar av Landssjúkrahúsinum verið, sum ikki síggjast á frímerkjaarkinum. Psykiatrisk deild, øking av seingjarplássum, viðgerðarhølum, fyrisiting og starvsfólkaíbúðir. Men av tí at hesar útbyggingar fella uttanfyri rammuna á hesari frímerkjaútgávuni, fara vit ikki nærri inn á tær í hesum umfarinum – annað enn at siga, at vit eru komin væl fram á leið, síðan J. Waagstein í 1943 sat í bakkanum yvir av og málaði "nýggja og stásiliga hospitalið í Havn."

*Anker Eli Petersen*



**Dronning Alexandrines Hospital, B-bygningurin og nýggi H-bygningurin**
Mynd: Katrin Joensen

## Farleiðin undir Skopunarfirði:

# Sandoyartunnilin










**Sandoyartunnilin**
Listaverk: Edward Fuglø
Myndir: Ólavur Frederiksen

Ein hin mest illgitna farleiðin millum oyggja er Skopunarfjørður – sundið millum Streymoy og Sandoy/Hestur – tiltikin fyri harðan sjóvarfallsstreym og stundum ógvusligar hvirlur. Á smalasta stað millum Sandoy og Streymoy er fjørðurin uml. 5,5 km breiður.

Skopunarfjørður hevur navn eftir Skopun – norðastu bygdini á Sandoynni. Fjørðurin verður vanliga mettur sum markið millum norðaru oyggjarnar og sunnaru, tvs. Sandoy, Hestur, Skúvoy Stóra Dímun og Suðuroy. Tá føroyingar tosa um norðanfjørðs og sunnanfjørðs, meina vit oyggjarnar hvørjumegin hesa linjuna, sum serliga markerar tey bæði stóru málførisøkini, norðanmál og sunnanmál – men eisini smærri mentanarligar munir millum økini bæði.

Tað hevur aldrin verið nakar vegur uttanum. Skuldi tú ferðast frá norðaru oyggjunum til sunnaru – ella umvent – noyddist tú um Skopunarfjørð. Hetta gekk antin frá Havnini ella Kirkjubø/Velbastað á streymoyarlandinum – til Skopun ella eystaru bygdirnar á Sandoynni. Ella víðari framvið eystursíðuni á Sandoynni til Suðuroyar.

Ferjusambandið til Skopunar, sum upprunaliga gekk frá Tórshavn, hevur seinastu mongu árini gingið frá Gomlurætt millum Velbastað og Kirkjubø – til havnarlagið í Skopun. Hetta ferjusambandið hevur til allar tíðir verið darvað av óregluligum rakstri, serliga um veturin, orsaka av veðri og streymlíkindum á fjørðinum.

### Sandoyartunnilin

Tað lætnaði tí fyri mongum, tá politisk avgerð varð tikin um at gera ein undirsjóvartunnil undir Skopunarfjørð beinleiðis til Sandoynna.

Fyrireikingarnar til tunnilsarbeiðið byrjaðu í 2016. Tunnilin skuldi byrja streymoyarmegin á ferjuleguni á Gomlurætt til Traðardal á Sandoynni, sum liggur millum Skopun og Sand. Eftir innleiðandi fyrireikingarnar varð av álvara farið undir at bora og spreingja sjálvan tunnilin frá tunnilsmunnunum báðum í 2019. Tann 3. februar 2022 rann saman millum báðar síðurnar, og síðan hava tey arbeitt við at leggja sjálva koyribreytina. Sandoyartunnilin lat upp fyri ferðslu tann 21. desembur 2023.

Sandoyartunnilin er 10,8 km langur, 9,5 m breiður og lægsta punkt liggur 147 metrar undir havbotninum. Brattasta helling í tunlinum er 5%.

## Ein løgasteinur móti endaliga málinum

Sandoyartunnilin er eitt risagleiv í bygnaðinum av føroyska samferðslukervinum – og yvirhøvur ein lætti hjá sandoyingum, sum endiliga sleppa undan lúnuta Skopunarfjørðinum. Men Tunnilin er eisini ein týðandi løgasteinur móti endaliga málinum – at gera enn ein undirsjóvartunnil frá Sandoy til Suðuroy – og harvið knýta allar tær føroysku høvuðsoyggjarnar saman við vegasambandi.

Í skrivandi stund er ongin endalig politisk avgerð tikin viðvíkjandi Suðuroyartunlinum.

Edward Fuglø, listamaður, hevur listprýtt Sandoyartunnilin. Verkið "Díðriksdúgvur og aðrir dýrgripir" er sett saman av tíggju hellismálningum úr ljósi í reyðum, hvítum og bláum rípum, sum daga undan svart basaltinum.

Myndevnini eru søgur úr Kirkjubø og Sandoy, og er myndevnið á 33KR frímerkinum Sverri Kongur (1151-1202), sum vaks upp í Kirkjubø.

*Anker Eli Petersen*




**Sandoyartunnilin, Gamlarætt**
Mynd: Ólavur Frederiksen

# Heimsfilmur í Tindhólmi

# Peter Pan







**Heimsfilmur í Tindhólmi: Peter Pan**
Mynd: Andrija Ilic

Hóast søgurnar eru gamlar, kunnu vit spegla okkum í teimum. Og skuldu vit gloymt gomlu søgurnar, so verða vit javnan mint á tær. Ikki bara í hondsettum prentaðum bókum, men eisini í talgildum filmi og tónleiki.

Hóast dagsins miðlar mangan verða mettir sum grunnir, kunnu teir eisini fevna gomlum søgum. Tað er gott, tí júst tær kunnu hava eina dýpd, sum blinkstrandi nútíðin sjáldan fær, og tí ofta kann hava fyri neyðini. Um ikki annað fyri at steðga á og grunda yvir tilveruna eitt bil.

Til dømis við søguni um drongin, Peter Pan, sum ikki vildi blíva vaksin. Úr tónleikinum kenna vit kanska best Michael Jackson, sum tók heitið á ævintýraoynni úr júst hesi søgu, og kallaði bústaðin Neverland.

Upprunin er fiktivi persónurin, Peter Pan, sum skotski Sir James Matthew Barrie (1860-1937) fyrstu ferð skrivaði um í 1902, og gjørdi til sjónleikin um *Drongin, ið ikki vildi blíva vaksin* í 1904. Í 1911 skrivaði Barrie skaldsøguna *Peter and Wendy*, har Neverland í nýggjastu filmútgávuni hjá Disney er sett til at verða Tindhólmur í Føroyum, har tey bæði, Petur og Wendy, nú síggjast flúgva.

Undir heitinum *Filming Locations* er Tindhólmur nýggjasta myndaevnið á føroysku frímerkjunum frá Posta.

Eitt frábrigdi av somu søgugongd hjá skotska Barrie hómast hjá týska Günter Grass í søguni *Die Blechtrommel* frá 1959, tá drongurin Oskar ikki vil blíva eldri. Eisini henda søgan um at halda fast um barnaárini, er gjørd til film.

Ævintýrliga søgan um Peter Pan bleiv ikonisk og kend um allan heim, tá Disney gjørdi animatiónsfilm í fullari longd úr henni í 1953. Hóast hesin filmur bleiv stílskapandi í hvørjum

herðashorni, vóru fleiri filmar longu gjørdir úr somu søgu frammanundan, eisini sangleikir. Men í útbreiðslu kundi eingin metast við Disney.

Sama er galdandi í dag, nú tey hava gjørt fantasy- og ævintýrafilmin Peter Pan & Wendy, sum David Lowery hevur leikstjórnað. Sum Wendy og Peter síggja vit Ever Gabo Anderson og Alexander Molony, sum nú flúgva á filmi yvir Føroyum.

Umframt at vaksin og kanska serliga hálvvaksin við hesi coming-of-age søgu kunnu gleðast um farnu barnaárini, er søgan eisini møtt við atfinningarsomum røddum, tí hon talar fyri eskapismu og at flýggja frá einum mangan truplum veruleika og gerandisdegi.

Tá Marianna Debes Dahl í 1999 týddi søguna til føroyskt, fann hon eisini uppá føroysk nøvn og heiti. Hon segði, at søguna um

*"Petur Pann, Vónbjørt og øll hini børnini kenna flest øll. Í dag kanska best frá Disneyteknifilminum, teknisøgum og øðrum skerdum útgávum. Her er upprunabókin um Petur Pann, drongin, ið ikki vil gerast vaksin. Í somu stund hann og álvavina hansara, Klombru-Glint, flúgva inn gjøgnum vindeygað í kamarinum hjá Vónbjørt og teimum, verður alt sum gandað. Børnini koma í Gyklaland og síggja havfrýr spæla sær á pollinum, fara í hernað móti Húki sjóræanaraskipara og hansara monnum og mangt annað."*

Í framhaldi av filmaðu søguni um James Bond norðuri á Kallinum, er ævintýrið um Peter Pan og Wendy Darling nú lagt vestur í Vágarnar, har vit finna Tindhólm á filmi.

*Birgir Kruse,*
*filmsummælari*



**Drangarnir og Tindhólmur í sólsetri**
Mynd: Thomas Vikra

# Kolavinna í Føroyum

# Kolanámið í Hvalba







**Kolanámið í Hvalba**
Gomul mynd:
Myndafólk ókent.
Mynd, kol: Trygvi Bech Árting

Gamla myndin er frá fyrst í 1960unum. Á myndini síggjast brøðurnir, Erhardt og Simon Næs.

Ferðafólk, sum vitja Føroyar um sumrini, undrast mangan á, hvussu grønar oyggjarnar eru. Tær eru so grønar, at tað er nærum rørandi.

Harumframt liggja oyggjarnar so tættar, at tað er ein serlig stórsligin uppliving, bæði í innflúgving og tá vit sjóvegis nærkast landi.

Undir øllum tí grasgrøna dúkinum goymist basalt, grót frá sløknaðum vulkanum. Tann syðsta oyggin, Suðuroy, hevur ta serligu søgu, at har kann ein við berum eygum síggja í bjørgum og lendi formatiónir, sum stava frá teirri tíðini, tá Føroyar fingu skap sum oyggjaland.

Suðuroyggin er eisini tann einasta oyggin, sum hevur kol í so stórum nøgdum, at har hevur verið virkin kolavinna. Í dag er kolið í Suðuroy meira mentan enn vinna, men slóðir eftir kolavinnuni eru nógvastaðni, og ein virkin kolamina er enn í Hvalba, tó at virksemið er sera lítið.

Tað fyrsta, vit vita um royndir at høgga kol í Føroyum, er fyri sløkum 300 árum síðan í 1733. Tað skuldi tó ganga knapp hálv øld, til kolavinna tók seg upp í 1778 í Hvalba. Føroyingar vóru ikki nógvir í tali um hetta mundið. Í fólkateljingini í 1801 búleikaðust einans 5.000 fólk í Føroyum, og dúvaðu føroyingar tá í tíðini upp á torv, so har var eingin áhugi fyri koli. Men harafturímóti vóru útlendingar, sum sóu møguleikar í kolagrevstri, eitt nú danir, sum eisini vóru áhugaðir í framleiðslu av koltjøru, og sviar, sum høvdu vónir um, at dýrabærur málmur goymdist í føroysku fjøllunum.

Hesar vónirnar vóru so mikið ítøkiligar, at múgvandi svenska kvinnan Christina von Post, ið virkaði sum listakvinna í París, saman við fransmonnum stovnaði eitt franskt felag, ið keypti rættindini til kolið í Suðuroy. Hetta var í 1875, og í Suðuroy varð Christina von Post vanliga kallað *Kolafrúan*, tí hon setti

so nógvan pening í kolið. Íleggjararnir vóru so vísir í, at sink, kopar og jarn fanst í kolanámunum í Suðuroy, at tey rindaðu nógvan pening fyri rættindini til kolagrevsturin. Tað man hava verið eitt stórt vónbrot fyri íleggjararnar, at eingin slíkur málmur var í Suðuroy. Christina von Post doyði í 1917, blóðfátæk.

Kolavinnan í Suðuroy var komandi og farandi upp gjøgnum tíðirnar. Føroyar vóru tá sum nú ávirkaðar av alheims búskapargongdini, og krakkið í Wall Street í 1929 elvdi til stórt arbeiðsloysi í Føroyum, eins og aðrastaðni. Tað eydnaðist tó, við hjálp frá lokalum vinnulívsfólki, at fáa gongd á aftur kolagrevsturin, har m.a. ljósur leirur, sum fanst í kolanámunum, varð sendur til Danmarkar, har hann varð brúktur á vatnverkunum at bloyta tað harða vatnið við. Hetta var leirur frá kolanáminum í Rangabotni. Hvalbingar sendu nakað av leirinum norður til Nólsoyar, har tey høvdu royðu í Hósmøl. Har blandaðu tey leir og royðu saman og gjørdu máling burturúr tí.

Tann heilt stóra broytingin við føroysku kolavinnuni hendi í sekstiárunum, tá ið fólk løgdu um frá kolkomfýri til olju og elektrisitet. Eftirspurningurin eftir koli bara minkaði og minkaði, og gjørdist sum frá leið so lítil viðfáningur í føroyska húsarhaldinum, at í dag eru tað bert nakrir nútímans brenniovnar, sum nýta kol. Kolagrevstur sum vinna er mest sum horvin, men ein virkin kolamina er eftir í Hvalba, sum fær almennan stuðul, mest fyri at halda kolagrevstrinum í hevd. Stuðulin er minkaður seinastu árini, og hvalbingar høgga í dag nøkur fá tons av koli



Kolanámsarbeiðarar í Hvalba í 1918

árliga. Tí er freistandi at siga, at í dag er kolagrevsturin í Hvalba meira mentan ella vinna.

Slóðir eftir útlendingar, sum upp gjøgnum tíðirnar hava verið virknir í føroysku kolavinnuni, síggjast aftur í eftirnøvnum í Suðuroy. Á Tvøroyri kunnu nevnast eftirnøvn sum Wiberg, Åkeson, Persson, Ahlén og Mårtensson, sum øll eru av svenskum uppruna.

Sum kuriosum kann nevnast, at hóast kolavinnan í dag er um at fara í søguna, og tað einans er ein virkin mina eftir í Prestfjalli í Hvalba í dag, so manglar ikki so nógv í at bora gjøgnum fjallið og koma út hinumegin. Varð hetta gjørt, høvdu vit havt eitt av heimsins vakrastu panoramaútsýnum út á hav og eftir bergtakandi fjallasíðuni og niður á bogar og sker fyri vestan á Suðuroynni. Henda verkætlan kundi verið ein hóskandi varði yvir eina vinnu, sum er farin í søguna, men sum gjørdi tað møguligt at uppliva fjallið, tær fjaldu lindirnar, stríðið og strevið, sum einaferð var inni í fjallinum, og stórslignu náttúruna við munnan vestanfyri.

*Ólavur Rasmussen*



**Karbidlampa við tveimum logum nýtt í kolanáminum í Hvalba**
Mynd: Eileen Sandá

Svanbjørg Manai gevst eftir

# 47 ár við frímerkjum

Svanbjørg hevur verið við heilt frá byrjan, tá Postverk Føroya og frímerkjadeildin vórðu stovnað í 1976

Fríggjadagin, 15. september var móttøka á Posta í sambandi við, at Svanbjørg Manai fer úr starvi eftir meira enn 47 ár og 1000 føroysk frímerki. Starvsfelagar, familja, kenningar og frímerkjasavnarar vóru møtt upp til sera væl vitjaða móttøku á Posta.

– Føroysku frímerkini hava havt ovurstóran týdning, tá tað snýr seg um kunning um Føroyar úti í heimi. Svanbjørg hevur verið við heilt frá byrjan, tá Postverk Føroya og frímerkjadeildin vórðu stovnað í 1976, og er við árunum vorðin andlit og umboð fyri bæði frímerkjadeildina og fyri føroyska mentan úteftir.

Í summar kundi Posta hátíðarhalda føroyska frímerkið nr. 1000, og Svanbjørg hevur sett sín dám á hvørt einasta av hesum 1000 frímerkjunum. Svanbjørg er errin av at hava rokkið hesum varðanum – bæði persónliga, men eisini í arbeiðshøpi.

Og sambært Posta eru tær leiðreglur, sum Svanbjørg var við til at gera fyri føroysk frímerki, framvegis galdandi fyri føroyskar frímerkjaútgávur. Hvørt frímerki skal siga eina søgu og virka sum ein lítil gluggi inn í føroyska mentan, søgu og viðurskifti annars.

Sjálv sigur Svanbjørg, at frímerkini hava verið hennara hjartamál frá fyrsta degi. “Har byrjaði eg, og har steðgi eg,” sigur hon.

Í sambandi við, at Svanbjørg fer úr starvi, hava starvsfelagar á Posta framleitt eitt frímerki, sum ímyndar Svanbjørg. Martin Mörck, heimsins kendasti gravørur, hevur graverað.



**Svanbjørg við andlitsmyndini og Ingun, leiðari á Frímerkjadeildini.**
Mynd: Posta

## Jólamerki 2023

# Friðareingil

Ár um ár kemur eingil jólafriðarins og minnir á, at sjálvt í kaldastu tíðum eru hitin og ævigi friðurin frá kærleikanum og samkensluni í hjørtum okkara.

Eingilin kemur við einum glógvandi ljósi, sum nertur við eitthvørt heim og hjarta. Áðrenn vit vita av, kemur ein ómetaligur friður yvir okkum, allar stúranir hvørva, og hjørtu okkara fyllast við nýggjari samkenslu.

Rundan um eingilin er ein riðil av hvítum dúgvum – ímyndin av reinleika, vón og vælvild. Hann kemur við kærleika og friðsælu henda jólaaftan.

*Jonna Ljósá, listakvinna*

*Unga, føroyska listakvinnan Jonna Ljósá hevur sniðgivið ársins jólamerki. Jonna Ljósá býr og starvast í Danmark. Sum barn var Jonna umgyrd av sjónum, sum elvdi til nógvar hugleiðingar, upplivingar og kenslur í uppvøkstrinum í Føroyum.*

*At vaksa upp við havið, við skiftandi veðrinum, náttúruni og umhvørvinum, hevur í stóran mun myndað listaliga stíl og mál hennara. Seinnu árini hava móðurskapur og barndómur somuleiðis havt ein stóran leiklut, eftir at hon sjálv er vorðin mamma. Hon granskar temu og myndevni frá hesum báðum heimum og frá krossvegnum, har teir møtast.*

*Jonna arbeiðir við sonevndari blandaðari tøkni og nýtir ofta endurnýtslutilfar, pastellkrit og vistfrøðiliga máling.*







**Jólamerki 2023**
**- eisini sum dupult jólakort**
Listakvinna: Jonna Ljósá













| | | | |
|---|---|---|---|
| **Nýggj útgáva:** | **Dronning Alexandrines Hospital 100 ár** | **Sandoyartunnilin** | **Heimsfilmur í Tindhólmi** |
| **Útgávudagur:** | 26.02.2024 | 26.02.2024 | 26.02.2024 |
| **Virði:** | 67,00 kr. | 23,00 og 33,00 kr. | 33,00 kr. |
| **Nummar:** | FO 1009 | FO 1010-1011 | FO 1012 |
| **Stødd, frímerki:** | 40,0 x 30,0 mm | 40,0 x 30,0 mm | 30,0 x 40,0 mm |
| **Stødd, smáark:** | 72,0 x 50,0 mm | | |
| **Myndir / listafólk:** | J. Waagstein, 1943 | Ólavur Frederiksen / Edward Fuglø | Andrija Ilic |
| **Prentháttur:** | Offset | Offset | Offset |
| **Prentsmiðja:** | Cartor Security Printers | Bpost, Belgia | Cartor Security Printers, Frankaríki |
| **Postgjaldsbólkur:** | Innanoyggja, 101-250 g. | Bræv innanoyggja og til útheimin, 0-100 g. | Bræv til útheimin, 0-100 g. |
| **Aðrar vørur:** | | Sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum | 1 postkort |

Frímerkini eru bert royndarprent og ikki altíð endalig.







| | | |
|---|---|---|
| **Nýggj útgáva:** | **Kolanámið í Hvalba** | **Postgjaldsmerki 2024: Útróðrarbátar** |
| **Útgávudagur:** | 26.02.2024 | 02.01.2024 |
| **Virði:** | 48,00 kr. | 4 x 23,00 kr. |
| **Nummar:** | FO 1013 | |
| **Stødd, frímerki:** | 30,00 x 31,66 mm | 55,0 x 22,5 mm |
| **Myndir / listafólk:** | Ókend / Trygvi B. Árting | Janus Dam Guttesen |
| **Prentháttur:** | Offset | Flexoprent |
| **Prentsmiðja:** | Bpost, Belgia | All4Labels, Danmark |
| **Postgjaldsbólkur:** | Innanoyggja brævpakki, 0-100 g. | |

**Vørurnar kunnu bíleggjast á www.stamps.fo uml. eina viku áðrenn útgávudagin**

**Layout:** Posta Stamps
**Perma:** Tindhólmur
**Mynd:** Andrija Ilic
**Prent:** Føroyaprent
ISSN 1603-0036

Posta Stamps
Óðinshædd 2
100 Tórshavn

**Tlf.** 346200
stamps@posta.fo
**www.stamps.fo**

@FaroeIslandsStamps
@faroeislandsstamps
@FaroeseStamps